## EG MEINI TAÐ



*John Johannessen, skrivar*

# Av óvart

Kavin í vikuni kom óvart á børn og vaksin, bilar og skip, krov og runnar. Soleiðis tykist at vera á hvørjum ári.

Fólkatingsvalið kom óvart á politikarar og konur, pressu og valnevndir, teg og meg. Soleiðis tykist vera hvørja ferð.

So løgin eru vit menniskju gjørd, at sjálvt tað sum vit vita og hava vitað leingi kortini kemur óvart á okkum.

At eg skuldi skriva henda greinastubba kom óvart á meg, hóast eg havi vitað tað í einar tveir mánaðir.

Um tað er rætt, at sjálvt tað, sum vit vita fer at koma, ikki kemur, fyrr enn tað kemur av óvart, so er spuningurin, um vit skuldu lagt á annan bógv og lagt tíðina betur til rættis. Pappírskalendarin er uppfunnin, men alt ov ofta er eingin lummi tøkur, har kalendarin kann vera í. Júst tá avtalan skal skrivast inn, liggur kalendarin heima, tí jakkin ella skjúrtan var skift tann dagin.

Fartelefonirnar kunnu setast at ringja, men tá tær bibba ella spæla »Ormin langa«, ja, so er tað tí battaríið er um at ganga undan.

Men til alla lukku hava vit telduna, sum hevur eitt ótal av møguleikum í Outlook. Her ber til at skriva avtalur og telefonnummur og krevja áminningar, men teldan er so illa konstruerað, at hon altíð stendur í einum øðrum rúmi, enn tí man sjálvur er í.

Ja, hetta kemur óvart á meg, at tað finnast so nógvir hentleikar, sum í roynd og veru, als ikki eru nøktandi.

Niðurstøðan er púra greið. Og lat tað ikki koma óvart á nakran. Høvdið, við innbygdum heila, er einasti kalendari, sum vit altíð hava við okkum. Men sjálvt um høvda-kalendarin er við okkum dagin langan, so røkkur hann heldur ikki.

Vit mugu helst liva við, at sjálvt tað planlagda kemur óvart á okkum.

Mín áminning er bara: Latið ikki jólini eisini í ár koma óvart á!!!

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: eirikur@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Eirikur Lindenskov

# »Eingin parkering báðu megin«

**Brot úr Sosialinum 10. november í 1976**



## FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI

*Eirikur Lindenskov*

»Hetta tvætlið er at síggja ymsa staðni í Havnini, og tað eru vaksin fólk, sum hava skrivað tað ella latið tað skrivað og ikki smábørn, sum ein kundi hildið eftir málberingini at døma. Tí tað sum hesir góðu menn meina er, at tað skal parkerast hvørgu megin, men tað tykjast teir ikki at duga at siga, og tí koma teir við hesum tvætlinum.«

Hesa viðmerkingina hevði Marius Johannesen, fyrrverandi háskúlastjóri, í Sosialinum 10. november 1976.

Orsøkin var tann, at Tórshavnar býráð hevði tikið stig til at fáa bilbukt við vaksandi parkeringsóskilinum, men málberingin á skeltunum var heldur »óheppin«.

Tað segðist eisini, at ein ávísur sakførari í Havn fór í rættin við eini parkeringsbót, hann hevði fingið, tí hann hevði bert parkerað í aðrari síðuni…

– Vit umhugsa at selja skipini, segði Ejler Jacobsen, formaður í felagnum Nótaskip, sum um hetta mundið hevði fund við landsstýrið. Felagið ynskti at fáa eina kvotu afturat upp á 5.000 tons.

– Sum støðan er nú, umhugsa fleiri skipaeigarar at selja skipini, segði Ejler Jacobsen við blaðið.

Formaður í Búskaparráðnum um hetta mundið er Johan K. Joensen. Hann sigur, at árið 1976 helst fer at roynast betri enn síðstu tvey árini: – Útflutningurin er í ár vaksin lutfalsliga meira enn innflutningurin, men vegna stóru skipaíløgurnar verður tó helst hall á gjaldsjavnanum, segði hann.

Grikkaland er hernaðarstýrt, og Sosialurin hevur stóra mynd av Mikis Theodorakis, kenda sangaranum, sum luttók í politikki í kommunistiska flokkinum. Hann fer at flyta aftur úr Grikkalandi, tí hann og familjan eru hótt við lívinum. Hetta er eitt av mongum dømum um, at alt ikki er, sum tað eigur at vera í Grikkalandi, staðfestir Sosialurin.

Sjónleikarhúsið í Havn er í føðingardagshýri, tí 27. november í 1976 fyllir felagið 50 ár. Skitsutekningar eru góðkendar av byggimyndugleikunum, og felagið fer nú undir útbygging, so skjótt sum fíggingin er greið.

Fótbóltsárið er endað – og TB vann FM-heitið fyri fyrstu ferð í 25 ár. Fótbóltsdeildin hjá FSF hevur ársaðalfund leygardagin og sunnudagin. Á skránni eru m. a. broytingar í kappingarreglunum. Formaðurin í fleiri ár, Poul Michelsen, tekur ikki við afturvali.

Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum, sigur á landsfundi felagsins, at dentur má leggjast á fjarleiðirnar. Hann heldur eisini, at tankin um foredling av freimleiðsluni ofta verður gjørdur ov einfaldur.

Útvarp Føroya fer nú aftur at leingja um senditíðina. Nú fer at verða sent til kl. 21 hvørt kvøld, og í longdu skránni verða m. a. tónleikasendingar og endursendingar.



# Hann myrdi mann mín! Ja, eg myrdi Olof Palme!



**Tað mangan umrødda morðið á svenska forsætisráðharran Olof Palme fyri skjótt 16 árum síðani kom brádliga framaftur fyri góðari viku síðani. Fyrst valdi einkjan eftir forsætisráðharran at tosa um málið, sum hon ongantíð hevur viljað tosað um, og síðani váttaði tann fríkendi Christer Pettersson, at tað var kortini hann, sum myrdi Olof Palme**

*Árni Joensen:*

Tað vakti stóran ans í Svøríki, tá fólk settu seg at lesa Dagens Nyheter tann 25. oktober. Tann annars so friðarliga Lisbeth Palme hevði brádliga játtað at tosa við ein fjølmiðil um tann syrgiliga tilburðin fyri skjótt 16 árum síðani og tað, sum síðani hendi. Men tað var ein avgjørd forsætisráðharraeinkja, sum lat frætta frá sær.

Trý ár eftir morðið á Olof Palme tann 28. februar í 1986 bleiv Lisbeth Palme sett andlit til andlits við ein mann, sum svenska løgreglan hevði tikið og skuldsett fyri morðið. Maðurin æt Christer Pettersson, og Lisbeth Palme var ikki í iva um, at hetta var drápsmaðurin.

Býarrætturin í Stockholm trúði henni og dømdi Christer Pettersson sekan í morðinum, men tá málið bleiv skotið inn fyri landsrættin, fekk tað brádliga eina aðra vend. Dómararnir høvdu ikki álit á vitnisfrágreiðingini hjá Lisbeth Palme, og Christer Pettersson varð fríkendur og latin leysur sum frælsur maður.

## Politikkur uppií

Lisbeth Palme hevur ongantíð viljað tosað alment um morðið ella rættarmálið hesi nógvu árini, men í samrøðuni við Dagens Nyheter sigur hon, at eftir hennara tykki vóru tað kanska politiskir tankar, sum fingu dómararnar í landsrættinum at taka ta avgerð, sum teir tóku.

Lisbeth Palme vísir á, at tær politisku andsagnirnar í Svøríki vóru sera stórar miðskeiðis í áttatiárunum. Hvørki rætturin, løgreglan ella fjølmiðlarnir megnaðu at standa ímóti trýstinum frá fólkinum.

-Olof varð forfylgdur ígjøgnum nógv ár. Eingin hevur kannað, hvussu óheftir dómararnir í landsrættinum vóru, sigur Lisbeth Palme við blaðið.

Spurd, um hon við hesum sipar til ta politisku sannføringina hjá teimum einstøku dómarunum, svarar hon:

–Ja, tað kunnu vit hugsa um. Forsætisráðharrin hevur tað hægsta politiska starvið. Tann politiski spenningurin var ógvuliga stórur, sigur Lisbeth Palme.

Hon leggur ikki fingrarnar ímillum, tá talan er um svenska rættarverkið, og hon harmast um, at málið ímóti Christer Pettersson ikki varð lagt fyri hægstarætt.

Sjálv heldur hon fast um sína vitnisfrágreiðing:

–Eg royndi í mong ár at goyma myndina í minninum. Eg lat meg ikki freista til at tosa við nakran um tað, sigur hon.

Men dómararnir trúðu henni ikki. Sjálv heldur hon ikki, at tað er ein trupulleiki hjá sær, men heldur ein trupulleiki hjá Svøríki sum rættarsamfelag.

## Ikki í iva

Lisbeth Palme minnist, at hon gjørdist ovfarin, tá hon á løgreglustøðini skilti, at maðurin, sum hon hevði sæð skjóta mann sín, var svii og eftir øllum at døma eisini rúsevnismisnýtari. Men hóast løgreglan gav henni fleiri menn at velja ímillum, var hon ikki eina løtu í iva og peikaði á Christer Pettersson. Hon hugsaði seg ikki nóg væl um, tá hon viðmerkti, at tað var ikki trupult at síggja, hvør av monnunum var misnýtari, tí júst hendan viðmerkingin bleiv nýtt ímóti vitnisfrágreiðing hennara undir rættarmálinum.

Dagens Nyheter spurdi Lisbeth Palme, hvussu tað ber til, at hon ongantíð hevur viljað tosað um morðið fyri skjótt 16 árum síðani.

– Eg kann ikki reisa málið. Eg havi vitnað, og dómararnir valdu ikki at trúgva mær. Tað merkir ikki, at eg havi mist trúvirðið fyri mær sjálvari. Eg havi átikið mær mína ábyrgd. Onnur mugu taka støðu til, um tey eisini hava gjørt tað. Men einum nýtist ikki at rannsaka seg sjálvan, og tað er eisini tað lættasta, sigur Lisbeth Palme.

## -Tað var eg!

Vakti samrøðan í Dagens Nyheter ans, vakti tað ikki minni ans, tá blaðið Expressen tveir dagar seinni almannakunngjørdi eina váttan frá Christer Pettersson um, at tað var hann, sum myrdi Olof Palme tann 28. februar í 1986.

Orðalagið í váttanini hevði útvarpsmaðurin Gert Fylking, sum er vinmaður Christer Petterssons, skrivað, og teir høvdu síðani báðir skrivað undir. Men samstundis kom fram, at Expressen hevði goldið Christer Pettersson 2000 krónur fyri at skriva undir uppá, at hann myrdi Palme.

Í einari útvarpssamrøðu endurtók Christer Pettersson, at tað var hann, sum myrdi Olof Palme. Spurdur, um hann helt, at málið eigur at verða avgreitt eina ferð med alla fyri at fáa endaliga greiði á spurninginum, svaraði Christer Pettersson, at tað visti hann ikki.

Men hann visti hinvegin væl, at tað kann gera tað sama, hvat hann sigur, tí sambært svenskari lóg kann hann ikki ákærast, sjálvt um at játtar seg sekan. Lógin krevur, at morðvápnið skal vera til taks, og skammbyrsan, sum drápsmaðurin hjá Palme nýtti, er ongantíð funnin.

Tí kann Christer Pettersson ikki dragast fyri rættin – sekur ella ikki, og tí fæst neyvan nakrantíð at vita, hvør drápsmaðurin veruliga var.

## FAKTA

Hjúnini Olof og Lisbeth Palme høvdu verið í biografi hetta kvøldið tann 28. februar í 1986. Filmurin var liðugur millum kl. 23.05 og 23.10. Eftir at hava prátað eina løtu við sonin Mårten fóru tey bæði til gongu suður eftir Sveavägen.

Við Adolf Fredriks-kirkjuna fóru tey fram við einari matstovu. Kl. 23.21 komu tey til krossin á tí vegnum, sum nú eitur Olof Palmes Gøta.

Á krossinum var ein handil. Ein av sýnisgluggunum vendi út ímóti Tunnelgatan og Sveavägen.

Tá Olof og Lisbeth Palme fóru fram við handlinum og út ímóti krossvegnum, kom ein maður undan handilshorninum og lat tvey skot av við einari magnum-skammbyrsu. Annað skotið rakti og drap Olof Palme.

Hitt skotið rakti Lisbeth Palme, men hon varð ikki álvarsliga skadd.

Maðurin, sum hevði skotið, rann eystur eftir Tunnelgatan og niðan trappurnar til Malmskillnadsgatan.

Løgreglan fekk av álvara áhuga fyri Christer Pettersson, tá vitni á heysti í 1986 greiddu frá, at hann hevði verið uttan fyri biografin um ta tíðina, tá Olof Palme varð myrdur. Harafturat fekk løgreglan at vita, at Christer Pettersson var farin aftan á Palme-hjúnunum eftir Sveavägen og ímóti morðstaðnum.

14. desember í 1988 tók løgreglan Christer Pettersson til avhoyringar. Sama dag bleiv hann fongslaður.

29. mai í 1989 varð Christer Pettersson ákærdur fyri morð og morðroynd.

1. juli í 1989 dømdi býarrætturin í Stockholm Christer Pettersson lívlanga fongsulsrevsing fyri at hava myrt svenska forsætisráðharran Olof Palme. Men rætturin var ikki samdur. Løgfrøðingarnir hildu hann vera ósekan og kravdu frídøming. Í oktober 1989 fríkendi landsrætturin Christer Pettersson. Málið fór ikki í hægstarætt.